

*Kári Thomsen frá felagnum Nýorka var í vikuni í Oljumálaráðnum saman við samstarvsfelagum úr Danmark og Belgia. Teir hava vónir um skjótt svar, tí freistin at søkja um ES-stuðul er brátt úti*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Milliónir bíða eftir at sleppa til Svínoyar

**Ein tvey ára orkuverkætlan uppá 20 milliónir krónur bíðar eftir at verða sett í verk í Svínoy. Felagið Nýorka og onnur hava ætlanir um vindorku og framleiðslu av gassunum súrevni og vetni, ið kunnu brúkast í smoltframleiðslu og til ravmagn. Svínoyingar eru áhugaðir og í vikuni var fundur við Oljumálastýrið. Er áhugi har, so er gøtan greið at fara til ein stuðulsgrunn hjá ES at søkja stuðul. - Bert føroyingar sjálvir kunnu seta fót fyri ætlanina, metir stigtakari**

ORKA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Svínoyingar eru vanir við verkætlanir og áður hava teir verið við í slóðbrótandi ætlan viðvíkjandi alnetinum.

Og nú er oyggin aftur miðdepil fyri sera áhugaverdari orkuætlan, ið er millumtjóða samstarv millum Føroyar Danmark og Belgia.

### Útlatið er vatn

Felagið Nýorka við Kára Thomsen gongur á odda í ætlanini, sum snýr seg um at seta upp tvær Vestas vindmyllur frá 1987 upp í Svínoy. Umframt at framleiða ravmagn til elkervið, skal eisini farast undir vetnisframleiðslu.

Tveir vatnbrunnar á 1000 litrar skulu veita vatn til eitt elektrolysuverk, ið framleiðir súrevni og vetni úr vatninum. Undir trýsti gerast hesi evni gass.

Smoltstøðin í Svínoy kann nýta súrevni í smoltframleiðsluni og harvið spara fitt av peningi, tí annars er hetta ein útreiðsla hjá smoltstøðum.

Høvuðsætlanin er at framleiða vetni til ein vetnismotor, ið framleiðir ravmagn og fjarhita til bygdina. Verður talan um avlop, kann bindast i netið hjá SEV og kann ravmagn tá førast úr Svínoy og har tørvur er á.

Útlátið frá vetnismotorinum er vatndampur og dálkar henda framleiðsla tí ikki umhvørvið.

### Bíða eftir svari

Talan er um millumtjóða samstarv og er tað Nýorka í Føroyum, Vestas og onnur í Danmark og fyritøkan Vandenborre úr Belgia, ið eru við. Møguleiki er tó hjá øðrum at koma uppí ætlanina og stórur áhugi er, sigur Kári Thomsen.

Saman við stjóranum í Vandenborre í Europa, Bart Van Ouytzel, og sølustjóranum hjá Vestas, var Kári Thomsen vegna Føroya Nýorku í vikuni á fundi við Oljumálastýrið.Har varð lagt fram, hvat ætlanin snýr seg um.

- Ráðharrin í orku- og umhvørvismálum var upptikin, men til staðar vóru vegna oljumálaráðið Herálvur Joensen og Arnstein Niclasen. Ætlnanin er longu viðgjørd úti í Svínoy og har eru tey positiv. Fyri at fáa eina umsókn viðgjørda í stuðulsgrunni hjá ES, skal viðmæli fást frá lokalum- og frá landsmyndugleikum. So í grundini er tað sera einfalt og einki bindandi verður kravt frá myndugleikunum, bert eitt tilmæli, sigur Kári Thomsen, sum vónar at fáa svar frá oljumálaráðnum í hesi vikuni, tí freistin at søkja stuðul frá ES er tann 17. desember.

- Fáa vit svar í vikuni, so fara vit á fund við ES og við verður stjórin í Vandenborre, Hugo Vandenborre, ið eisini hevur sagt seg hugaðan at hitta føroysku myndugleikarnar, sigur Kári Thomsen.

### Positivt

Spurdur, hvat SEV sigur til hesa orkuætlanina í Svínoy, vísur Kári Thomsen á, at teir hava SEV sum part í verkætlanini.

Kári Thomsen sigur, at enn hevur samband tó ikki verið við SEV um ætlanina, men er hetta av teirri einfaldu orsøk, at valig mannagongd er at venda sær til myndugleikarnar fyrst og síðani at venda sær til aðrar partar.

- Ætlnanin er tøkniliga ikki truplari enn so, enn at ein maskinmeistari kann ansa verkinum, tí tøknin er kend. Fólk eru sera positiv viðvíkjandi ætlanini og fleiri fyritøkur, t.d. maskinverkstøð, hava víst áhuga at sleppa uppí part, sigur Kári Thomsen tvey ára verkætlanina, ið snýr seg um einar 20 milliónir krónur..

– Vert er at minnast til, at myndugleikarnir ikki skulu samtykkja nakað nú, men bert vísa, at teir eru positivir. Sjálvandi er ikki víst, at vit fáa peningaliga stuðulin frá ES, men útlitini eru góð og hava vit stuðlar innan ES veggirnar, sum hava sagt seg stuðla hesi ætlanini. Bert føroyingar sjálvir kunnu seta fót fyri ætlanina, sigur Kári Thomsen

### Ógvast um okkara oljunýtslu

Kári Thomsen er kendur innan orku og umhvørvi og tekur eisini lut á fundum og ráðstevnum hesum viðvíkjandi. Tá hann fyri stuttum á Kreta helt fyrilestur hjá EREC — European Renewable Energy Council — um varandi orkuloysnir, undraðust fólk stórliga á okkara oyggjasamfelag, sum hevur so stóra oljunýtslu og sum liggur so ovarlaga, tá tað snýr seg um lond, ið dálka.

- Christina Linz frá Erec kom við inniligari áheitan um at søkja hjá ES um stuðul til eina verkætlan við varandi orku, sigur Kári Thomsen.

- Oljunýtslan ger okkum eisini sera bundnan at útheiminum og ein kreppa í Miðeystri t.d. ávirkar okkum rættiliga skjótt, vísur Kári Thomsen á, og hann metir, at tíðin er komin at taka annað skinn um bak, men enn kann hann bert bíða eftir svari frá landsins myndugleikum og hann vónar at fáa svarið, so felagið Nýorka klárar at fyrireika eina umsókn til ES innan 17. desember.

### Fakta

<u>Ætlan:</u>
2004; vindmátarar uppsettir í Svínoy
2005; Apríl; Vindmyllur reistar og onnur útgerð sett upp og gjørd til reiðar. Juni; Elektrolysuverkið verður klárgjørt, eins og vetnismotorur og onnur úrgerð so sum káplar og rør.Telduskipan (Power Pool) gjørd klár og íbundin intra- og iternet. Oktober; Klárt at royndarkoyra. Noveber; Orkuframleiðsa
2006: eftirmeting.

<u>Annað:</u>
Nýorka er við í europeiskum samstarvi um vindorku (European Wind Energy Association)
Í Svínoy eru góð vindviðurskifti og gott internetsamband og er oyggin tí vald til verkætlanina
Vetnismotorur framleiðir ravmagn úr H2 og útlátið er bert vatndampur






## Kom og steðga vónloysinum

Vit kunnu øll ávirka teir myndugleikar, ið hava ábyrgdina av, at fólk verða fongslað av órøttum, pínd ella avrættað. Tú kanst gera tað við at fara inn á heimasíðuna hjá Amnesty International í Føroyum og tekna teg til at Skriva fyri lívi. Teknar tú teg til átakið, fært tú trý brøv um mánaðin, sum tú kanst senda teimum, ið hava ábyrgdina av, at mannarættindi verða brotin.

Tess fleiri, ið gera vart við órættvísi kring heimin, tess betur ber til at ávirka tey, ið hava ábyrgdina. Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN
Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

## Um flutning av alifiski v.m.

Kunngerð nr. 98 frá 8. juli 2003 ásetur, hvussu flutningur av akvakulturdýrum v.m. skal fara fram. Í kunngerðini verður m.a. ásett, at allur flutningur av akvakulturdýrum, -úrdráttum, -burturkasti, -fóðri og brúktari akvakulturútgerð skal fara fram í lukkaðum flutningseindum og soleiðis, at vatn ikki verður stoytt undir flutninginum.

Fiska- og djórasjúkudeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni hevur sett sær fyri at fáa ætlanina við kunngerð nr. 98 frá 8. juli 2003 førda út í verki, og hetta førir m.a. við sær eitt víðkað eftirlit við, at allur flutningur av akvakulturdýrum fer fram við lukkaðum og góðkendum flutningseindum.

Við heimild í kunngerð nr. 98 frá 8. juli 2003 ger Heilsufrøðiliga starvsstovan fylgjandi ásetingar (um ikki annað er nevnt, eru allar tilvísingar til hesa kunngerð):

- **EFTIR 15. JANUAR 2004 VERÐUR BERT LOYVT GÓÐKENDUM FLUTNINGSFYRITØKUM AT TAKA SÆR AV FLUTNINGI, SUM ER FEVNDUR AV KUNNGERÐINI**
  Søkjast skal um góðkenning innan 1. januar 2004
- **EFTIR 15. FEBRUAR 2004 SKAL ALLUR FLUTNINGUR Á LANDI, SUM ER FEVNDUR AV KUNNGERÐINI, FARA FRAM VIð GÓÐKENDUM FLUTNINGSEINDUM**
  Søkjast skal um góðkenning innan 1. februar 2004
- **EFTIR 15. FEBRUAR 2004 VERÐUR BERT LOYVT GÓÐKENDUM BRUNNBÁTUM AT TAKA SÆR AV FLUTNINGI, SUM ER FEVNDUR AV KUNNGERÐINI**
  Søkjast skal um góðkenning innan 1. februar 2004

Viðvíkjandi sóttreinsing av frárenslvatni verður víst til kunngerð nr. 72 frá 26. juli 2002 um sóttreinsing av frárenslvatni frá akvakulturbrúkum og akvakulturvirkjum v.m. Sóttreinsing av frárenslvatni skal fara fram við tøkniligari útgerð og sóttreinsingarhátti, sum eru góðkend av Heilsufrøðiligu starvssstovuni. Í nevndu kunngerð sæst, hvørji krøv verða sett til sóttreinsingarháttin og tøkniliga útgerð.

- **FLUTNINGSFYRITØKAN HEVUR ÁBYRGDINA AV, AT ALT FLUTNINGSVATN VERÐUR SÓTTREINSAÐ EFTIR GALDANDI ÁSETINGUM**

Sí annars heimasíðu okkara á **WWW.HFS.FO**

Vinaliga

**FISKA- OG DJÓRASJÚKUDEILDIN**

## P/F Beta
og
## P/F Kongshavn
**hava fingið nýggj telefonnr.**

| | | |
|---|---|---|
| **P/F Beta** | **Tel.** | **470070** |
| | **Fax** | **470071** |
| **P/F Kongshavn** | **Tel.** | **470070** |
| | **Fax** | **470081** |

**P/F Beta & P/F Kongshavn**
Kongshavn 1
Postboks 111
600 Saltangará

Sosialurin
-tað loysir seg

## Kunngerð

Skattalistin fyri 2002 liggur frammi til alment eftirlit í gongini á kommunuskrivstovuni frá hósdegnum 20. november til og við hósdagin 4. desember 2003.

Götu Kommuna



## Eysturoyingar
**Eysturoyar Teoriskúli**

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 19. november**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**
**Ole Lykke, tel 220972**
**Jari Lykke, tel 503002**

Sosialurin 341800

## Klinikkassistentur

Í sambandi við burðarfarloyvi søkja vit eftir **avloysara fyri klinikkassistent at byrja mánadagin 5. januar 2004.**

Talan er um fulltíðarstarv.

Umsøkjarar við útbúgving hava fyrimun.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. november 2003.

**Tannlæknastovan hjá Unnur Jensen**
Varðagøta 26
Box 3142
110 Tórshavn